# Viðmerking til Rolf Guttesen

Hans Andrias Sølvará

Í viðmerking til grein hjá mær um fyrstu koppsetingarnar í Føroyum skrivar Rolf í seinastu Dimmalætting, at hann heldur okkara kjak um fyrstu koppsetingarnar vera liðugt. Tað haldi eg eisini, at tað er, men so leingi sum Rolf ikki gevur heilt rættar upplýsingar og fer lætt um keldur vil eg ikki lata hansara orð standa ósvarað.

## Skeiv upplýsing

Í greinini tykist Rolf leggja meg undir at seta fram sjónarmið, sum hava við sær, at fleiri prestar fimm ferðir hava skrivað skeivt í kirkjubókina. Hetta er beinleiðis skeivt. Tað er eitt - eitt - dømi funnið í kirkjubókunum, har prestarnir frá 1816 skuldu skráseta koppsetingar, um, at ein persónur er skrásettur at vera koppsettur áðrenn 1803. Heldur ikki skrivaði eg, at eg ikki hevði álit á kirkjubókum, bert, at "um so er", - eg endurtaki "um so er" - at vit halda okkum til samtíðarkeldurnar, sum upplýsa, at koppingarevnið hjá Jenner ikki kom til Føroyar fyrr enn í 1803, so er "valla" annar møguleiki enn, at onkur prestur eini 15 ár seinni hevur skrivað skeivt koppsetingarár – í hesum førinum 1802 – í kirkjubókina. Tað verður týðiliga nevnt - enntá í yvirskrift - í greinini, at talan er um "eitt ósamsvar" millum samtíðarkeldur og seinni upplýsing um koppseting, sum prestur seinni, í 1817, hevur skrásett í kirkjubók. Tað verður eisini týðiliga nevnt í greinini, at koppsetingar, sum prestar síðan 1816 hava skrásett at hava verið framdar í 1803-1805, ikki eru í stríð við samtíðarkeldur.

Eg havi hvørki nevnt og ella bara ró framundir, at fleiri prestar fimm ferðir hava skrivað skeivt í kirkjubókina.

## Sannroyndir og møguleikar

Síðan setur Rolf fram eina hypotesu um "2 møguleikar" ella koppingarspor í føroysku koppingarsøguni.

Annar er, at m.a. Løbner umvegis vandamiklu pokusmittuna hjá Jomfru Hammershaimb í oktober 1801 var fyrstur at fáa gamla koppingarevnið (inoculatión) frískt til Føroyar við einum skipi, og hin er, at Nólsoyar Páll í september 1805 kom við nýggja koppingarevninum hjá Jenner (vaccinatión). Tað er møguligt, men um Rolf hervið gevur okkum ta fatan, at talan er um tveir javnbjóðis søguligar "møguleikar" í eini hypotesu um tvey koppingarspor í føroysku koppingarsøguni, so fáa vit eina bronglaða mynd av føroyskari koppingarsøgu. Tí hvørki í søguligum kjølfesti ella møguligum týdningi er talan um tveir javnbjóðis møguleikar – langt frá.

Tað undrar meg eisini, at hann ikki sær aðrar møguleikar enn akkurát hesi bæði sporini frá 1801 og 1805.

At Nólsoyar Páll í september 1805 kom til Føroyar við Royndini Fríðu við tí slóðbrótandi koppingarevninum hjá Jenner, sum fyrstu ferð varð roynt í Danmark í 1801, er so væl skjalprógvað í ymiskum samtíðarkeldum, at vit skulu vera óvanliga atfinningarsom mótvegis Nólsoyar Pálli fyri ikki at góðtaka hetta sum eina søguliga sannroynd. Tað er eisini skjalfest í trúligum samtíðarkeldum, at Nólsoyar Páll framdi hetta við at koppseta manningina, ein fyri og annan eftir, soleiðis at koppingarevnið varð frískt, tá Royndin Fríða kom til Føroyar. Og tað var koppingarsporið við koppsetingini hjá Jenner, ið gjørdist avgerandi fyri føroysku koppsetingina.

Hinvegin mugu vit vera serliga trúføst mótvegis Løbner fyri koma til ta uppáhald, at Løbner í 1801 skal hava verið fyrstur at koma til Føroyar koppingarevni. Í fyrra lagi er stórt sæð útihýst, at Jomfru Hammershaimb á túrinum var koppsett av Løbner, sum sostatt longu í 1801 skuldi havt fingið frískt koppingarevni hjá Jenner til Føroyar, soleiðis sum Rolf fyrr hevur gitt, tí hon var sum eg havi víst á sjúk av barnapokum – ikki koppsett. Hendan hypotesan er avvíst og tað tykist Rolf eisini hava viðurkent. Í øðrum lagi skrivaði Løbner ein mánað eftir ferðina úr Keypmannahavn frágreiðing til rentukamarið, har hann nevndi, at Jomfru Hammershaimb hevði fingið "Børnekopper ... den Rædsomme ... Sygdom", uttan at nevna eitt orð um, at hann ella nakar annar fyri fyrstu ferð var farin at koppseta í Føroyum við eldra, vandamikla koppingarháttinum, sum Rolf nú rør fram undir. Rolf nevnir hetta sum ein "møguleika", men í veruleikanum verður møguleikin settur fram sum sjálvstøðugt koppingarspor á jøvnum føti við tað staðfesta nýggja koppingarsporið "frá 1805": "Fyri at siga hetta heilt klárt, so verður inoculatión eitt spor í søguni frá 1801, meðan vaccinatiónin frá 1805 verður eitt annað". Trupulleikin er, at tað illa ber til at síggja, hvat Rolf byggir hesa "Løbner-1801-hypotesuna" á.

Gamla koppingarevnið, sum varð kent í dansk-norska ríkinum langt áðrenn ein almennur koppingarstovnur varð settur á stovn í Keypmannahavn í 1769, kann í veruleikanum vera komið til Føroyar - í gløsum - nærum nær tað skal vera í 1700-talinum, men tað var so vandamikið at brúka, onkuntíð deyðiligt, at tað ongantíð fekk nakra serliga undirtøku, og í 1810 varð øll inoculatión í dansk-norska ríkinum forboðin. Kirkjubøkurnar, sum Rolf tykist hava álit á, skráseta bert "vaccinatiónir", t.e. koppsetingar við nýggja koppingarevninum, ikki "inoculatiónir", t.e. koppsetingar við tí gamla koppingarevninum. Tá havt verður í huga, at í Danmark varð longu í 1801 farið undir at brúka tað nýggja, vandaleysa koppingarevnið, og at tað longu í 1803 varð sent til Føroyar í gløsum, so tykist tað eisini lítið sannlíkt, at eitt møguligt "spor í søguni" við tí gomlu koppsetingini "frá 1801" kann hava havt nakran týdning yvirhøvur. Avgerandi er, at Rolf heldur ikki hevur nakrar keldur at byggja hetta ógvuliga ivasama gitið á. Heldur ikki nýggja Løbner-hypotesan hjá Rolf um eitt koppingarspor í Føroyum við tí eldru koppsetingini "frá 1801", tykist vera til nakra aðrastaðni enn í hansara egna hugaheimi.

Her er ikki talan um "2 møguleikar", men søguliga sannroynd og eitt ósannlíkt git við ongum grundarlagi.

## Endaorð

Sjálvur haldi eg meg framvegis til tað, sum viðkomandi samtíðarkeldur upplýsa: at nýggja koppingarevnið varð sent til Føroyar fyrstu ferð í 1803, meðan gongd ikki kom á koppsetingina fyrr enn í september í 1805. Akkurát tað, sum eg longu 17. apríl upplýsti í greinini í Dimmu um tann seinasta pokusjúklingin í Føroyum.

Hetta fari eg at halda meg til til møguligar aðrar viðkomandi samtíðarkeldur koma undan kavi, sum kunnu siga okkum nakað annað. Søga snýr seg um tað, sum vit við støði í kritiskari viðgerð av teimum varðveittu og viðkomandi samtíðarkeldunum mest sannlíkt kunnu vita, ikki um tað, sum uttan keldur verður gitað.

